
Bretar stóran áhuga fyri el-kaðali úr Íslandi



Ísland eigur stórar møguleikar at troyta bæði vatnorku og orku frá jarðarhitanum

Nógvir fyrimunir við elkaðalsambandi tvørtur um Norðuratlantshavið — tekniskt eingin trupulleiki — búskaparliga og umhvørvisliga ein stórur bati. Alternativa orkunevndin í bretska undirhúsinum skal nú viðgera eina elkaðal-ætlan. Sosialurin hevur tosað við stigtakaran

orð: *Jan Müller*

Nú krøvini til eitt reint umhvørvi gerast alsamt strangari, eru bretar av álvara farnir at vísa alternativum orkukeldum ans. Ein teirra er ein rættliga kollveltandi ætlan, sum leingi bert hevur verið mett sum fantasiprojekt: at flyta streym gjøgnum heimsins longsta sjókaðal á havbotinum millum Ísland og Skotland.

Tað hevur verið tosað og skrivað um ein tílíkan elkaðal í meira enn 10 ár, men ikki fyrr enn nú eru bretar av álvara farnir at vísa ætlanini ans.

Tíðindablaðið Sosialurin hevur tosað við ein av høvuðsmonnunum aftanfyri el-kaðalætlanina, Dr. Tom Hammons, sum er ravmagnsverkfrøðingur við lærda háskúlan í Glasgow. Hann hevur nú í nógv ár arbeitt við málinum og heldur tað vera so mikið sannførandi, at hann er farin at greiða almenninginum í Skotlandi og Bretlandi frá innihaldinum í ti.

Tom Hammons ivast onga løtu í, at ein elkaðal millum Ísland og Skotland fer at gerast veruleiki um ikki so mong ár. Fyrimunirnir eru so nógvir, at her er als einki at ivast í. Hann heldur eisini, at føroyingar kunnu fáa stóra nyttu av einum tílíkum elkaðali.

Men hvar liggur málið í løtuni, spurdu vit Tom Hammons, sum nú í nøkur ár hevur arbeitt saman við íslendskum verkfrøðingum við hesum stóra spurningi.

25 mia. kr.

Talan er um eina samlaða verkætlan uppá 25 milliardir krónur. Stór tøl, men smáting sammett við, hvat ein fær burtur úr.

Tom Hammons sigur, at fyri Bretland er ein tílíkur elkaðal tað einasta rætta, serliga nú tosað verður so nógv um at minka um brúkið av teimum fossilu orkukeldunum so sum olju, kol o.ø. Hetta eru tær orkukeldurnar, sum dálka okkara umhvørvi mest og sum fáa álvarsamar fylgjur fyri alt okkara framtíðar umhvørvi, gera vit einki nú fyri at troyta aðrar orkukeldur.

Bretland hevur enn gjørt lítið fyri at troyta aðrar orkukeldur, sum dálka minni enn tær verandi. Men Bretland hevur saman við mongum øðrum londum givið lyfti um at minka um dálkingina frá eitt nú orkuframleiðslu. Hetta er so ein upplagdur møguleiki, sigur Tom Hammons, sum eisini vísir á aðrar fyrimunir, eitt nú tann ikki so lítið týandi, at streymurin tá eisini verður nógv bíligari.

Tom Hammons sigur víðari, at tað fer at verða bíligari at fáa streym gjøgnum ein kaðal úr Íslandi enn at framleiða elorku frá bæði kjarnorku- og kolorkuverkum. Eisini verður íløgan í ein elkaðal kappingarfør við aðrar orkuframleiðslur so sum gassturbinur.

Ísland ríkt uppá orku

— Hví skulu vit framleiða dýra orku, sum eisini dálkar okkara umhvørvi, tá vit hava aðrar møguleikar, sum bæði eru bíligari og als ikki dálka, spyr Tom Hammons og vísir til teir sera stóru og ótroyttu orkumøguleikarnar í Íslandi frá eitt nú vatnmegi og jarðarhita.

Íløgurnar í eina slíka verkætlan eru heldur ikki dýrari enn so, at tær kunnu niðurskrivast eftir einans 25 árum. Eftir hetta er orkan ókeypis.

Ísland hevur møguleikar at framleiða 3.400 MW frá vatnorkuverkum og 2.300 MW frá geotermiskum verkum, verða hesar orkukeldur troyttar. Ísland, sum hevur 250.000 íbúgvar, ger í dag bert brúk av 8% av hesi orkuni, sigur Hammons við Sosialin.

Verður verkætlanin til nakað, so skulu byggjast nøkur orkuverk í Íslandi, og fýra 500 MW 1000 kilometrar langir kaðalar skulu leggjast á havbotnin úr Íslandi til Skotlands. Móttøka skal gerast í Skotlandi og linjur setast upp haðani til Onglands.

Langtíðarætlan

Mett verður at fyrsti kaðalin til 500 MW kann verða klárur at taka í nýtslu um 7 ella 10 ár, kaðalarnir til hini 1500 MW kunnu vera klárir innan ár 2010. So her er ikki júst talan um eina íløgu fyri dagin í dag ella í morgin, men hon fer so kortini at vera sera hent, tá vit fara inn í næstu øld.

Uppá fyrispurning um tað er møguligt at leggja so langar kaðalar á havbotnin, sigur Tom Hammons, at hetta er einki nýtt. Slíkir kaðalar eru longu veruleiki aðrastaðni í verðini. Ein er millum Frakland og Bretland, og ein er millum Svøríki og Finland. Verður ein elkaðal millum Ísland og Skotland veruleiki, verður hann tann longsti í heiminum av sínum slag.

Teir fýra kaðalarnir verða 15 cm tjúkkir og verða lagdir á havbotnin í longdum uppá 100 kilometrar hvør. Hetta er lætt arbeiði og verða teir settir saman á havbotninum, sigur Tom Hammons, sum sjálvur trýr uppá hesa verkætlanina.

Teknologisku framstigini innan kaðalar av hesum slag eru so stór, at tað í dag er als einki til hindurs fyri at fáa eina slíka trygga orkuveiting eftir havbotninum millum Ísland og Skotland. T.v.s. at ein kaðal hevur allar fyrimunir bæði teknologiskt, búskaparliga og umhvørvisliga. Tom Hammons vísir tó á, at tað helst verður torført at figgja eina so stóra verkætlan bara við privatum midlum. Tað almenna má vera við.

Eisini íslendingar vóna, at elkaðalin gerst veruleiki. Agnar Olsen, stjóri í íslendska orkufelagnum, sigur í einum tíðindaskrivi frá universitetinum í Glasgow, at hann inniliga vónar, at verkætlanin fer í gongd. Ein tílíkur elkaðal kann fáa stóran týdning fyri íslendska búskapin eins og fyri møguleikarnar at fáa bíliga orku. Ætlanin er eisini, at streymurin skal kunna fara báðar vegir, alt eftir tørvi. Seinni verður so hugsað um at útbyggja eina slíka kaðalskipan til onnur lond eisini, soleiðsi at bíligari og reinari orka verður tøk.

Nógvir fyrimunir

Tom Hammons heldur sjálvur, at fyrimunirnir við einum elkaðali úr Íslandi fyri Bretland eru so nógvir, at verkætlanin eigur at verða sett í gongd. Við slíkari reinari orku minka vit um sýruregnið, sum í dag kemur frá olju- og kolriknum oljuverkum, vit minka um radioaktivu dálkingina frá kjarnorkuverkum, og vit sleppa undan at brúka av annars virðismiklum orkukeldum.

Tom Hammons hevur arbeitt við elkaðalætlanini í fleiri ár, men tað er serliga hesi bæði seinastu árini, at henda ætlan hevur vakt ans. Ikki minst tá álagt verður heimsins londum at minka um dálkingina frá orkuframleiðslu.

Vatnorkuverkini kunnu eisini sleppa av við streym til Bretlands gjøgnum elkaðal, tá goymslurnar eru fullar

Elkaðal-ætlanin var fyri fyrstu ferð víst fram fyri almenninginum á eini stórari orkuráðstevnu í Boston í desember mánað í fjør, har Tom Hammons greiddi frá verkætlanini.

At elkaðal-verkætlanin verður tikin í største álvara vísa boðini, sum Tom Hammons fyri stuttum fekk úr London. Hann skal nevniliga møta í Undirhúsinum seinni í ár fyri at greiða Nevndini fyri alternativar orku frá projektinum.

— Tá tú fær slík boð, so er tað tí, at menn síggja tað skilagóða og neyðuga í eini slíkari ætlan, sigur Tom Hammons við Sosialin.

